MARKNAÐARRÁK VIKA 20 2007

KINA HÆKKAR

Kina var enn einaferð í andgletti á marknaðunum í farnu viku. Keypsskálarnir í bæði Shanghai og Hong Kong hækkaðu 2,5% mánadagin. Hesuferð var orsøkin, at stjórnin hevur valt at loyva kinversku bankunum at gera íløgur fyri upp til helvtina av íløgukapitalinum uttan fyri Kina. Hetta svarar til íløgur fyri 7 mia. amerikanskar dollarar. Væntandi verða tað tey kinversku partabrøvini, sum eru skrásett í Hong Kong, sum fara at hækka mest orsakað av nýggju reglunum. Hetta tí tað eru hesi feløgini, kinversku bankarnir kenna best.

Annars var finska Nokia eisini í andgletti í farnu viku. Tey uppmettu marknaðarpartin í 2. ársfjórðingi. Tey góvu ikki nakað nágreiniligt tal, men søgdu hann fór at verða størri enn tey 36%, hann var í 1. ársfjórðingi. Mett verður, at tey taka marknaðarpart frá Motorola. Nokia-partabrøvini hækkaðu 5% av hesum tíðindum.

GJALDOYRU:

Dollarin liggur á 5,50 eins og fyri viku síðan. Hetta er omanfyri tað lægsta sum var fyri tveimum vikum síðani, tá kursurin var 5,458. Lítið bendir á at hann hækkar munandi komandi tíðina, nú ferðin á amerikanska búskapinum er minkað. Bretska pundið viknaði í vikuni eftir at vøksturin í húsaprísunum gjørdist minni enn væntað. Vit vænta at bretska rentan hækkar minst 0,25% aftat í ár og hetta kann styrkja pundið.

LÁNSBRÆVARENTUR HÆKKA AFTUR

Hesa farnu vikuna eru lánsbrævarentur aftur hækkaðar. 10-ára rentan er nú 4,34%, og hon fer væntandi at hækka meira hesa vikuna.

HESA VIKUNA

Hetta verður væntandi ein hendingarík vika á marknaðunum. Prísvøkstur verður kunngjørdur báðu megin Atlantshavið. Um hann gerst hægri enn væntað aðru megin, styrknar væntandi tað gjaldoyrað.

Vísital fyri [illegible] partabrøv



Dansk 10-ára renta



Marknaðir	Kursur	+/- %
[illegible]	1415,70	[illegible]
Alheims partabrøv	[illegible]	-0,24%
Atlantic Petroleum	326,50	[illegible]
[illegible]	110,50	-0,29%
[illegible]	550,10	[illegible]
JPY	[illegible]	+0,18%
[illegible]	1488,36	[illegible]

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK

SKEMMAN søkir handilslærling

Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir

www.skemman.fo

Vit bjóða:

- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum – bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

Vit vænta at tú ert:
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

Kunning um Skemmuna:
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans, á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

Skúlagongd:
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

Krøv:
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn – í seinsasta lagi 1. juni 2007 – til:

SKEMMAN
Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn
ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

Staravegur 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 31 55 88 · www.skemman.fo

SKEMMAN

ÍDNAÐARLABORANTUR

Søkt verður eftir ídnaðarlaboranti til starvsstovu okkara at byrja 6. august 2007 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er eitt fulltíðar farloyvisstarv í 1 ár við møguleika fyri føstum starvi.

Starvið umfatar m.a. ráværueftirlit, eftirlit av lidnari vøru, framleiðslu av reagensum og viðlíkahald av GMP góðskuskipanini.

Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Eyðhild Fuglø á tlf. 34 11 00.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. juni 2007.

TJALDURS APOTEK
R.C. Effersøesgøta 31
Postboks 3010
110 Tórshavn
www.apotek.fo